**Ein mannamúgva savnað er**

F
1. Ein mannamúgva savnað er,
G C
við skundi higar leiðin ber;
F
hoyr, kennir tú tann ferðamann,
C F
sum slíka múgvu savna kann?
F C F
:,: Hoyr, skarin rópar, har hann fer:
F G7 C
Jesus úr Nasaret kemur her! :,:
F F
:,: Hoyr, skarin rópar, har hann fer:
C7 F
Jesus úr Nasaret kemur her! :,:

2. Tað Jesus var, sum gekk umkring,
bar øllum hjálp, ið vóru ring,
hann grøddi sjúku, lætti neyð,
gav heilsubót – og lív til deyð,
:,: so blind og deyv øll róptu við:
Jesus úr Nasaret fer framvið! :,:

3. Úr bygd í bygd hann gongur enn,
ber bjarging við til falnar menn.
Hann gjørdi mikil undur fyrr,
í dag hann er við tínar dyr.
:,: Úr syndum vil hann loysa teg,
tí kemur Jesus nú henda veg. :,:

4. Á troytta sál, hoyr hansar' rødd,
tú, sum í neyð og sorg ert stødd!
Kom nú, hvør syndatyngda sál,
lat Jesus leiða teg á mál!
:,: Tveit burtur alt, ið hindrar tær,
Jesus úr Nasaret er so nær! :,:

5. Men rekur tú hann burt frá tær,
vanvirðir tað, hann ber við sær,
til einkis varð hans náðirødd,
tú fert til gravar – illa stødd.
:,: Ov seint, ov seint, tú fekst ei frið –
Jesus úr Nasaret fór framvið! :,:
*Luk. 18,37.*
*Etta Campbell 1863. Edm. í Garði.*
Lag: Hj. 355. F-dur, c.